Filmur í Norðurlandahúsinum:

# Dayereh - Sirkulin




**»Dayereh« er farsi og merkir sirkul. Farsi er almenna málið í Iran, og hetta er heiti á filmi haðani, sum fyrrárið fekk fyrstu virðisløn á filmstevnu í Venesia. Í filminum, sum filmsfelagið KLIPP sýnir í Norðurlandahúsinum mánakvøldið, fylgja vit átta kvinnum, sum á ymsan hátt eru settar til viks í samfelagnum**

FILMUR
*Filmsfelagið Kipp*

Hóast vit so at siga bert síggja amerikanskan film herheima, er tað als ikki Amerika, ið ger flestu filmar. Stórsti filmsframleiðari hevur í mong ár verið India, har stóri filmstaðurin verður róptur *Bollywood*. Men millum heimsins stóru filmslond, telist eisini Iran. Og nú verður høvi at síggja nakað so rárt, sum ein av nýggjastu, og hartil virðisløntu, iransku filmunum.

Mánadagin sýnir filmsfelag Norðurlandahúsins filmin *Sirkulin*. Hetta er triði filmurin, sum iranski leikstjórin Jafar Panahi (f.1960) stendur fyri. Á altjóða filmsstevnu í Venesia fyrrárið, varð *Sirkulin* kosin at fáa fyrstu virðisløn, sonevnda gull-ljónið.

## Stríðskvinnur

*Sirkulin* er ein filmur, sum festir seg í minnið. Á ein greitt skipaðan og naknan hátt lýsir filmurin brot úr dagligdegnum hjá átta ymiskum kvinnum í Iran í árinum 2000.

Á ymsan hátt verða søgur teirra samantvinnaðar gjøgnum felagsheitið, tær hava sum fyrrverandi brotskvinnur, ella í minsta lagi kvinnur, sum eru dømdar av stýrinum. Onkrar eru leysgivnar, meðan aðrar eru flýggjaðar, og vit eygleiða stríð teirra, har tær royna at venda aftur til eina sømiliga tilveru.

Sjálvt um Iran í allar mátar er langt burturi, tekur filmurin okkum á bóli við sínum spenningi og ikki slepst undan at liva seg inn í lagnurnar hjá persónunum, bæði tá tær geva skarvin yvir, og tá tær halda fast um trúnna á eina betri framtíð.

*Sirkulin* hevur ongantíð verið sýndur í Iran, men í øðrum londum hevur hann verið stórliga fagnaður, og tískil er tað ein serligur heiður, at hann nú kann sýnast í Føroyum.

41 ára gamli leikstjórin Jafar Panahi hevur gjørt fleiri spælifilmar. Við filminum Sirkulin hevur hann fingið altjóða viðurkenning og harvið slóða fyri iranskum filmi, eisini á okkara leiðum.

*Í Iran, sum telur 65 mió fólk, eru tilsamans 300 biohallir.*

## Iran í Göteborg

Í hesum døgum er hin 25. altjóða filmstevnan í Göteborg. Hetta er stórsti norðurlendski filmsmarknaður og umframt at vísa nýggjastu altjóða og norðurlendsku filmarnar, so hevur alt síðani 1987 verðið serligur siður at sýna film, sum er úr Iran.

Í 1998 var annar filmur Panahi's "Spegilin" sýndur í Göteborg. Filmurin, sum stavaði frá árinum fyri, setir eisini kvinnuna í miðdepulin.

Í ár eru ikki færri enn tólv nýggir iranskir spælifilmar á skránni í Göteborg. Heiðursgestur er kvinnuligi iranski filmsleikstjórin Tahmine Milani. Í Götebrog fer hon at sýna egna filmin "The Hidden Half", sum er um unga kvinnu, ið minnist aftur á islamsku kollveltingina í Iran í 1979, tá hon læs á lærda háskúlanum.

Filmsstevnan í Göteborg, har sýndir verða ikki færri enn 510 stutt- og spælifilmar, heldur áfram til og við mánadagin 4. februar.

## Norðurlond og tey fremmandu

- Hvussu fáa vit minka um ræðsluna fyri teim fremmandu? Hetta er millum fremstu spurningar, sum norðmenn vilja varpa ljós á, nú teir taka yvir formanskapin í Norðurlendska Ráðharraráðnum. Hetta sigur tíðindatænastan Norden i veckan hesa vikuna.

Norski barna- og familjuráðharrin Laila Dåvøy vil fyrst og fremst styrkja fatanina hjá teim ungu, tá um ræður siðbundnu norrønu virðini. "Harumframt vil Noreg, nú vit fá formanssessin í Ráðharraráðnum leggja seg eftir at fáa á tal børn og ung úr útnyrðings Russlandi og teim sonevndu nærumráðunum", sigur norski barna- og familjuráðharrin, sum eisini nevnir ítøkiligar ætlanir at berja niður fremmandahaturin og spírandi nasismuna millum norskan ungdóm. Eitt av endamálunum er at skapa samstarv millum norðurlendskan ungdóm, sum er av fremmandum uppruna og sum framhaldandi vilja búgva í Norðanlondum.

Hinvegin nevnir norðurlendska tíðindatænstan hjá Norðurlandaráðnum hesa vikuna eisini donsku støðuna, har øll av fremmandum uppruna fáa strengari kor at liva undir, verður sonevndi útlendinga-politikkurin samtyktur. Henda ætlan hjá donsku stjørnini verður løgd fram í Fólkatinginum fyri 1. mars.

Í Norðanlondum eru gjørdir fleiri filmar, sum á ymsan hátt lýsa støðuna hjá fremmandum, sum velja at skapa sær nýggja tilveru í okkara londum. Eitt skemtiligt íkast í so máta var svenski filmurin *Jalla Jalla*, sum Filmsfelag Norðurlandahúsins sýndi fyri fullum húsum hin 7. januar.

Grimi álvarin aftan fyri henda skemtiliga filmin kom tó til sjóndar í farnu viku, tá ein pápi beindi fyri dóttrini, tí hon ikki vildi giftast einum, hann hevði kosið.

- Iranski filmurin Sirkulin verður sýndur í Norðurlandahúsinum mándagin hin 4. februar klokkan 19:30. Filmurin varir hálvan annan tíma, er á farsi máli og hevur danskan undirtekst.

# Løgmaður sent Fogh bræv um OL-viðurkenning

**Løgmaður sendi fríggjadagin danska forsætisráðharranum Anders Fogh Rasmussen eitt soljóðandi skriv:**

OL-VIÐURKENNING



*Løgmaður, sum er verji hjá ÍSF, er nú kominupp í leikin at vinna Føroyum OL-viðurkenning. Hann hevur sent forsætisráðharranum bræv hesum viðvíkjandi*

– Jeg vil først takke dig for de meget gode og konstruktive samtaler, vi havde under dit besøg her i sidste uge, sigur løgmaður í brævi, hann í gjár sendi Anders Fogh Rasmussen.

Brævið er soljóðandi:

»Anledningen for dette brev er, som jeg også nævnte for dig under dit besøg, at jeg både som Færøernes lagmand og som protektor for Færøernes Idrætsforbund (Ítróttasamband Føroya - ÍSF) naturligvis gerne vil støtte forbundet i deres bestræbelser for at blive anerkendt af den Internationale Olympiske Komite (IOC) som Færøernes Nationale Olympiske Komite (NOC).

En sådan anerkendelse ville umiddelbart betyde, at færøske idrætsudøvere kunne repræsentere Færøerne ved de Olympiske Lege, som ville have umådelig stor betydning for det færøske folk og i særdeleshed for vore idrætsudøvere, der ville få helt nye og yderst motiverende muligheder indenfor de forskellige idrætsgrene.

ÍSF har i sinde at tilsende IOC en formel ansøgning om anerkendelse som NOC for Færøerne hen imod efteråret d.å. Før dette vil ÍSF kontakte IOC vedrørende den planlagte ansøgning.

I forbindelse med disse forberedelser har ÍSF henvendt sig til mig med ønske om, at jeg udfærdiger en skrivelse, som både dokumenterer Færøernes politiske ledelses tilslutning til anerkendelsen af en færøsk national olympisk komite og som dokumenterer Færøernes specielle og relativt selvstændige konstitutionelle status under dansk suveræntitet. Jeg har nu udfærdiget en sådan erklæring for ÍSFs agtværdige formål.

Det ville utvivlsomt have en vigtig understøttende virkning på ÍSFs dokumentation, om også Danmarks statsminister ved en, om end muligvis ganske kortfattet, skrivelse ville tilslutte sig, at der af IOC anerkendes en national olympisk komite for Færøerne.

ÍSF har tilkendegivet, at sådanne eventuelle erklæringer fra henholdsvis Danmarks statsminister og Færøernes lagmand, i givet fald planlægges indkorporeret i en brochure af en vis kvalitet, således at dokumentationen overfor IOC og eventuelle andre får en appellerende iklædning.

I forhåbning om, at du velvilligt vil overveje det her nævnte, vedlægger jeg til din orientering kopi af lagmandens erklæring om sagen«.



# Skálaborg eitt skrímsl

**- Skálaborg er einki minni enn eitt skrímsl. Bygningurin er alt ov stórur og grefligur í útsjónd, og hvørki hóskar ella passar inn í miðbýin. At lagt bygningin inni á Sundi hevði verið meiri hóskandi, sigur Tordur Thorsteinsson, formaður í Miðbýarfelagnum í Havn**



*- Verður ein so stórur bygningur settur á Skálatrøð, missa vit nógv parkeringspláss og tað ber rætt og slætt als ikki til, sigur Tordur Thorsteinsson, formaður í Miðbýarfelagnum í Havn*

SKÁLABORG
*Turið Kjølbro*

Allar súður eru ikki syftar í ætlanini at byggja ein 7000 fermetra stóran bygning á Skálatrøð í Havn. Í farnu viku løgdu stigtakararnir ætlanina fram fyri myndugleikar og almenning, og sum skilst er hon ikki endaliga liðug. Eitt nú er kostnaðurin av ætlanini ikki útroknaður. Men stendur tað til Miðbýarfelagið í Havn og einstaklingar, kemur ætlanin um henda stóran bygningin, sum á mannamunni hevur fingið heitið Skálaborg, ikki longur enn á skriviborðið. Einstaklingar eru nevniliga í ferð við at savna undirskriftir inn í Havn í mótmæli ímóti ætlanini, og Miðbýarfelagið, har allir handlarnir í Havn eru limir í, er ikki sinnað at tosa fyri ætlanini.

- Hasin bygningurin er einki minni enn eitt skrímsl, alt ov stórur og grefligur í útsjónd. Hann hvørki hóskar ella passar inn í miðbýin. At lagt hann inni á Sundi hevði verið meiri hóskandi, sigur Tordur Thorsteinsson, formaður í Miðbýarfelagnum í Havn.

Miðbýurin yður av lívi og virksemi. Nógvir handlar eru komnir afturat í seinastuni, uttan tó at veganet og parkeringspláss fylgja við. Hetta er størsti meinbogin fyri miðbýin, heldur formaðurin í Miðbýarfelagnum.

- Verður ein so stórur bygningur settur á Skálatrøð, missa vit nógv parkeringspláss og tað ber rætt og slætt als ikki til. At stigtakararnir skulu útvega fleiri parkeringspláss, trúgvi eg einki uppá. Umframt klárar vegurin oman á Skálatrøð ikki eina økta ferðslu. Verður ætlanin veruleiki, skal ein nýggjur høvuðsvegur gerast oman til økið, og tí er als ikki pláss fyri.



Sambært formanninum í Miðbýarfelagnum er eingin í felagnum fyri ætlanini at byggja ein so stóran bygning á Skálatrøð.

- Sjálvsagt er tað gott, at nógvir handlar eru í miðbýnum og at eldraíbúðir verða bygdar, men alt skal valdast.

Hann roknar ikki við, at ætlanin um stóra bygningin verður av nøkrum. Skuldi nakað verðið bygt á Skálatrøð, kundi tað verðið bygningurin, sum Katrin Dahl, fyrrverandi býráðslimur í Havn, tosaði fyri á sinni, heldur Tordur Thorsteinsson. Hetta var ein bygningur í fimm hæddum, sum lá tætt inn ímóti berginum. Niðasta hædd varð ætlað handlum, meðan ovaru hæddirnar vóru eldraíbúðir.

- Hesin bygningurin tók ikki eitt parkeringspláss og hóskaði í útsjónd væl inn í umhvørvið á Skálatrøð, sigur Tordur Thorsteinsson.

Miðbýarfelagið hevur fleiri ferðir tosað við Tórshavnar býráð um tørvin á, at fleiri parkeringspláss verða útvegað miðbýnum.

- Stóra trotið á parkeringsplássum er ein stórur trupulleiki. Støðan er fullkomiliga vónleys, og hóast vit fleiri ferðir hava tosað við myndugleikarnar um hetta, hendir einki.

# Norðurlendsk rithøvundarundferð



*Tóroddur Poulsen úr Føroyum er í uppskoti til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina fyri yrkingasavnið Blóðroyndir, ið kom út í 2000*

**Leygardagin 9. februar verður bókmentatiltakið í Norðurlandahúsinum í Føroyum. Høvundarnir, ið vera við, eru Kari Aronpuro, Ib Michael, Mikael Torfason, Eva Runefelt, Tóroddur Poulsen, Lars Saabye Christensen, og Ole Korneliussen**

MENTAN
*Turið Kjølbro*

Komandi leygardag, tann 2. februar, skipar Nordbok, sum er norðurlendska bókmenta- og bókasavnsnevndin og sum í ár hevur 40 ár á baki, fyri upplestri og samrøðum á Den Sorte Diamant í Keypmannahavn við nøkur av teimum, sum eru í uppskoti til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins. Tey, ið eru við, eru Tóroddur Poulsen úr Føroyum, Lars Saabye Christensen og Hans Herbjørnsrud úr Noregi, Peter Kihlgård úr Svøríki, og Ole Korneliussen úr Grønlandi. Erik Skyum-Nielsen verður frásøgumaður. Tiltakið endar við, at áhoyrararnir kjósa dagsins virðislønarvinnara.

Hetta tiltakið er tað fyrsta í eini størri rithøvundarundaferð til bókasøvn og mentanardeplar í Norðurlondum, sum byrjaði í Helsingfors seinasta mánadag, 28. januar. Ferðin heldur fram fyrst til Åbo, Mariehamn, Stockholm, Århus, Keypmannahavn, Göteborg, Oslo og Bergen, og síðani úr Reykjavík og Tórshavn til Nuuk, har ferðin endar 11. februar, sum er sama dag, sum virðislønarvinnarin verður avdúkaður.

Leygardagin 9. februar kl. 16.00 verður bókmentatiltakið í Norðurlandahúsinum í Føroyum. Høvundarnir, ið vera við, eru

Kari Aronpuro, Ib Michael, Mikael Torfason, Eva Runefelt, Tóroddur Poulsen, Lars Saabye Christensen, og Ole Korneliussen.

Tey, ið eru í uppskoti í ár at fáa Norðurlendsku Bókmentavirðislønina eru Tóroddur Poulsen úr Føroyum, Klaus Høeck og Ib Michael úr Danmark, Kari Aronpuro og Ulla-Lena Lundberg úr Finnlandi, Mikael Torfason og Gyrdir Eliasson úr Íslandi, Lars Saabye Christensen og Hans Herbjørnsrud úr Noregi, Eva Runefelt og Peter Kihlgård úr Svøríki, Ole Korneliussen úr Grønlandi, og Kirsti Paltto úr samiskan máløkinum. Virðislønin er 350.000 danskar krónur.

# Astrid Lindgren deyð

**- Eg vil ikki skriva til vaksin. Eg vil bara skriva til lesarar, sum kunnu skapa undur. Bara børn skapa undur, meðan tey lesa, hevur Astrid Lindgren einaferð sagt**



MENTAN
*Turið Kjølbro*

Mánadagin andaðist heimsgitni svenski barnabókarithøvundurin, Astrid Lindgren, 94 ára gomul. Síðsta mánaðin hevur Astrid Lindgren verið sjúk av einum álvarsomum virusbruna.

Kendastu bøkurnar, Astrid Lindgren skrivaði, vóru Pippi Langsokk, Emil úr Lønnibergi, Ronja Ránsmannadóttir, Brøðurnar Leyvuhjarta og Børnini í Dundurdali. Bøkurnar um Pippi eru ivaleyst tær kendastu og eru millum tær mest lisnu barnabøkur nakrantíð í nógvum londum. Tískil hevur hon havt ómetaliga stóra ávirkan á børn, og fer uttan iva at hava tað í framtíðini eisini.

Hon varð mangan biðin um at skriva til vaksin, men noktaði altíð.

- Eg vil ikki skriva til vaksin. Eg vil bara skriva til lesarar, sum kunnu skapa undur. Bara børn skapa undur, meðan tey lesa, segði Astrid Lindgren einaferð

Astrid Lindgren hevur fingið nógvar bókmentavirðislønir, men ongantíð tær heilt stóru, Norðurlendsku Bókmentavirðislønina ella Bókmentavirðisløn Nobell.

Astrid Lindgren varð fødd 14. november í 1907 í Vimmerby. Í 1931 giftist hon við Sture Lindgren, sum var stjóri.